Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Ingilín D. Strøm, løgtingsmaður

Svarari: Helgi Abrahamsen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Evni: Hellutangi vesturi á Víkum

Spurningar:

1. Hvørjar verða umhvørvisligu avleiðingarnar av, at Hellutangi í longri tíð liggur vesturi á Víkum, og hvussu verður syrgt fyri, at tær verða avmarkaðar?
2. Heldur landsstýrismaðurin, at økið vesturi á Víkum er vælegnað til aling?
3. Eru ætlanir um at tryggja, at tilbúgvingarætlan fylgir við umhvørvisgóðkenningum til aling o.a. virksemi, ið kann hava avleiðingar fyri náttúruøkir?

Viðmerkingar:
Enn er ongin náttúrufriðingarlóg ella lendisætlan um, hvørji øki í Føroyum skulu varðveitast uttan at verða ávirkað av menniskjahond - eitt nú hvat skal vera ídnaðarøki og hvat skal vera friðað.
Áðrenn aliloyvið varð givið við umhvørvisgóðkenning vesturi á Víkum, heittu borgararar saman við Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag á Yvirfriðingarnevndina at friða alt økið vesturi á Víkum. Hetta er eitt øki, har Fjallavatn og økið uttan um vatnið longu er friðað. Tó høvdu felagið og borgararnir ikki rætt at verða hoyrd í málinum.

Men aliloyvið varð givið við umhvørvisgóðkenning. Reglur eru í umhvørvisgóðkenningini um krøv, ið skulu lúkast, um óhapp er. Tó er onki krav um tilbúgvingarætlan.

Tann 5. apríl í ár sleit fóðurflakin vesturi á Víkum seg leysan og rak á land. Har hevur Hellutangi ligið síðan. Fleiri royndir hava verið gjørdar at draga Hellutanga leysan, men enn er ongin roynd eydnast. Nú hoyra vit, at Hellutangi verður liggjandi í allan vetur, og at ætlanin møguliga er at flyta hann í pettum. Tað kann hugsast, at tað fær avleiðingar fyri umhvørvið vesturi á Víkum. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 9. august 2021

Ingilín D. Strøm